M
E
N
T
A
M
Á
L
A
R
Á
Ð
I
Ð

# FÓLKASKÚLIN

# FØROYSKT
# 9. FLOKKUR

Týsdagin 26. mai 2015
kl. 10.15 - 13.45



Mynd: Gulakur Zachariasen

Loyvt er at nýta hjálparmiðlar

# Vel eitt av hesum evnunum og skriva um tað:

**1. Litríki høvuðsstaðurin** ........ s. 3

- Greina og tulka myndina
- Sig tína hugsan um hana

*Yvirskrift*: *Litríki høvuðsstaðurin*

**2. Tjóvurin** ........ s. 4-5

- Greina og tulka stuttsøguna
- Sig tína hugsan um støðuna hjá høvuðspersóninum
- Hvussu hevði tú mælt honum til at loyst trupulleikan?

*Yvirskrift*: *Tjóvurin*

**3. 7 dagar uttan iPhone** ........ s. 6-7

- Greið í stuttum frá, hvat teksturin er um
- Hvat tekstaslag er hetta?
- Hvussu er bygnaðurin?
- Hvønn vendir teksturin sær serliga til?
- Hvat er endamálið við tekstinum?
- Heldur tú tað vera eina avbjóðing onga iPhone at hava í 7 dagar? Grundgev!

*Yvirskrift*: *7 dagar uttan iPhone*

**4. Sólarmyrking** ........ s. 8-9

- Greið í stuttum frá, hvat tekstirnir eru um
- Greið frá, hvussu tú upplivdi 20. mars 2015
- Hugleið um tað at ferðast til serligar hendingar

*Yvirskrift*: *Sólarmyrking*

**5. Risakonan við kambfjøðurini** ........ s. 10

- Greið í stuttum frá skaldskapi av mannamunni
- Greina og tulka ævintýrið
- Vís á ævintýreyðkenni í hesum ævintýrinum
- Hvør er boðskapurin í ævintýrinum?

*Yvirskrift*: *Risakonan við kambfjøðurini*

# 1 Litríki høvuðsstaðurin

- Greina og tulka myndina
- Sig tína hugsan um hana



Myndin *Torshavn – a City full of Colours*, sum Ingi Sørensen hevur tikið, er úr blaðnum *Atlantic Review - Autumn 2013* Atlantic Airways Inflight Magazine. Blaðið liggur í øllum flogførunum hjá Atlantsflogi.

**Í tíni viðgerð skalt tú m.a. greiða frá:**

- tí, sum tú veitst um myndina
- myndaslagi (málningur, fotomynd, viðgjørd mynd, lýsing el.a.)
- innihaldi
- hvussu myndin er skipað (t.d. forsýni, miðsýni og baksýni)
- litum og ljósi
- hvør ætlanin við myndini er (sendari – evni/miðil – móttakari)

# 2 Tjóvurin

- Greina og tulka stuttsøguna
- Sig tína hugsan um støðuna hjá høvuðspersóninum
- Hvussu hevði tú mælt honum til at loyst trupulleikan?

Hann hevði næstan mist andan. So leingi hevði hann verið undir kavi. Nú lá hann púra stillur í vatnskorpuni og hvíldi seg, bara nøsin kom uppundan.

Sum tað var svalandi og fjálgt at liggja her, langt burtur frá øllum larmi, púra einsamallur.

Hann hugsaði um deyðan og um, hvussu tað mundi vera at drukna. Hann hevði hoyrt, at lættari deyði var ikki, og hann helt, at so mundi vera. Um hann nú læt seg søkka og lá eina løtu stillur á botninum, so doyði hann, so var alt endað – og so var alt gott.

Henda hugsan fekk slíkt vald yvir honum, at hann mátti ríva seg leysan frá henni og svimja í land. Meðan hann nú sat á einum kletti og læt sólina turka seg, fór hann aftur at hugsa um deyðan, og nú stóð alt klárt fyri honum, bæði at hann hugsaði so, og hví hann hugsaði so.

Hann var farin heiman um morgunin við teirri vissu hugsan, at hann skuldi gera enda á sær sjálvum, tí tíggju ferðir heldur vildi hann tað enn falla í rættarins hond. Hann hevði stolið, tað nyttaði einki at dylja fyri tí og heldur ikki at pynta um tað. Hann hevði stolið, og hvørja løtu kundi hann vænta bátin úr Havn. Og tað versta av øllum var tað, at hann hevði stolið frá manni, ið átti minni enn hann sjálvur.

Hann var farin inn í stovu mansins. Har lógu hundrað krónur á borðinum, tað var eisini út av lagi gáloysið ikki at læsa sínar dyr, tá ið hundrað krónur lógu á borðinum.

Eingin var inni – og hann tók peningin. Eingin kundi gruna, at tað var hann, ið stolið hevði, tí hann átti jú so nógv. Men tað var komið soleiðis yvir hann, hann mátti gera tað, kundi ikki lata vera.

Og hann var sæddur. Hann visti tað, kundi síggja tað á bygdarfólkinum, tey gingu øll av vegnum fyri honum, og so hugdu tey eisini so undarliga upp á hann, sum vildu tey sagt: "Har gongur tjóvurin, har gongur hann, ið hevur meira enn nokk av øllum og so – stjelur hann."

Í dag kom fútin, og so varð hann settur í skansan. Hann settist at lata seg í skjúrtuna. Á, tann skomm, tann herviliga skomm, hon bøttist ikki aftur. Alla ævi sína skuldi hann vera ein merktur maður. Hann slapp sær í buksurnar, hosurnar og skógvarnar, og so fór hann til gongu heim aftur.

"Ross, lús og fjandi," mutlaði hann fram fyri seg, meðan hann gekk heim eftir, "tú hevur ikki so frægt dirvi, at tú torir at taka teg sjálvan av døgum. Á tví, tví." Hann spýtti og skelkti at sær sjálvum. "Tjóvur, tjóvur."

Honum var hyggjandi út á fjørðin. Har kom ein bátur rógvandi inneftir. Báturin úr Havn, hugsaði hann; so verður rættargongd.

Og knappliga kom hann at hugsa um alt, sum stóð hann uttan fyri sjálvur.

Hann sá stóra stovu fyri sær, hitt reyðmálaða borðið stóð mitt á gólvinum, fútin sat frammanfyri tí, strangur á at líta. Yviri við dyrnar stóð ein politistur, meðan hann sjálvur stóð og segði frá øllum.

Hann krympaði seg saman av skomm.

Hann vendi við og gekk oman aftur í fjøruna. Hann kom beint fram á gjónna, sum segðist at vera botnleys.

Har settist hann. Gjógvin gekk beint inn í fjallið, og har inni hevði eingin verið, har mátti vera gott at liggja.

Hann tveitti seg útí. Klæðini tyngdu eitt sindur, men hann dugdi væl at svimja, so tað gjørdi ikki petti; hann svam beint inneftir, so langt, at hann føldi, hvussu ljósið kámaðist burtur. At enda var heilt myrkt.

Tá læt hann seg søkka – djúpt, djúpt niður.

Eftir Hans A. Djurhuus. Úr bókini *Smásøgur og ævintýr*, 1922



http://poyeliku.livejournal.com/759675.html

**At hugsa um, tá ið tú greinar stuttsøgur:**

- kjarnan í søgugongdini
- hvussu søgan er bygd upp
- frásøgufólk og sjónarhorn
- tíð (nær er søgan skrivað/ nær fara hendingarnar fram/ hvussu long er søgutíðin)
- stað
- persónar og atburð
- mál og myndamál
- mótsetningar í søguni

# 3 7 dagar uttan iPhone

- Greið í stuttum frá, hvat teksturin er um
- Hvat tekstaslag er hetta?
- Hvussu er bygnaðurin?
- Hvønn vendir teksturin sær serliga til?
- Hvat er endamálið við tekstinum?
- Heldur tú tað vera eina avbjóðing onga iPhone at hava í 7 dagar? Grundgev!

**Röddin hevur spurt iPhone ofrið, Rannvá Andreasen, um hon klárar 7 dagar uttan telefonina. Les um avbjóðandi vikuna hjá henni her!**

21. mars 2014
Rannvá Egholm

**16 ára gamla Rannvá Andreasen úr Havn tók av avbjóðingini “7 dagar uttan iPhone”:**

**Sunnukvøld kl. 23.59, sløkti eg mína iPhone og legði hana í eina skuffu. Tað verður hennara heim komandi 7 dagarnar… eftir ætlan. Eg havi funnið mína gomlu Samsung fram, og tað skal vera mín fartelefon hesa tíðina. Hetta fer at verða løgið.**

**Mánadag**
Vekjarin á mínari Samsung ringdi kl. 7, men eg fann ikki telefonina. Hon er so lítil í mun til mína iPhone. Men at enda fann eg hana hóast alt.
Tá eg kom inn í skúlastovuna, sótu tvey fólk inni í stovuni, bæði við iPhone, og eg saknaði longu mína. Tað sama var í fyrsta fríkorterinum, vit vóru 4 fólk inni í einari stovu, og eg var tann einasta uttan eina smartphone. Tað var ikki til at fáa orðið á nakran av teimum, meðan tey sótu og gløddu í sína smartphone. Tá byrjaði eg at hugsa, at eg hevði nokk verið upp á sama máta, um eg hevði havt mína, og eg føldi meg væl, at eg ikki sat soleiðis. Restin av skúladegnum fór upp á sama máta; eg sat saman við smartphone-ofrum. Men eg fylgdi yvirraskandi væl við í tímunum og fekk nógv meira burturúr enn vanligt.

**Týsdag**
Henda dagin var eingin trupulleiki við ongari iPhone. Eg hevði listabreyt allan dagin og hevði ikki stundir at hugsa um telefonina. Eg fór eisini til arbeiðis seinni á degnum, og har brúki eg aldrin telefonina, so tað var akkurát sum vanligt. Eg var ikki heima aftur fyrr enn á midnátt, og tá var eg so móð, at eg sovnaði beinanvegin.

**Mikudag**
Kl. 8 hugdu vit at filmi í skúlanum, tað var ein góður filmur, og eg var glað, at mín iPhone ikki var har og órógvaði. Næsta blokk svav eg fyri tað mesta, og tá saknaði eg hana heldur ikki. Kanska droymdi eg um hana, men tað minnist eg ikki, um eg gjørdi. Eg fekk frí kl. 11.30 og fór so heim. Heima var eingin trupulleiki uttan telefonina, eg fann upp á ymiskt annað, t.d. setti eg meg at tekna við oljulitum, og tað havi eg ikki gjørt í langa tíð. Kl. 17 fór eg til arbeiðis og var har til 23.30.
Tá ið eg kom heim, vildi eg gjarna tendra mína iPhone. Tá saknaði eg hana nógv. Eg hevði hana í hondini, men eg læt vera. Eg vildi klára hetta.

**Hósdag**
Vit hugdu at restini av filminum frá degnum fyri. Seinni høvdu vit íverksetan, og vit fóru oman í tingið, tí 2. viðgerð av broyting av hjúnabandslógini var. Tá ið eg var í tinginum, hugsaði eg, at eg gjarna hevði viljað havt mína iPhone, men eg kom yvir tað. Tað var áhugavert at bara sita og lurta. Restina av degnum var eingin trupulleiki, og eg

saknaði hana slett ikki. Var blivin glað um, at eg ikki hevði tendrað hana enn. Men eg sat meira við telduna henda dagin, enn eg havi gjørt leingi. Ikki tí eg saknaði mína iPhone, men eg fann nógv feitt á netinum.

**Fríggjadag**

Eg saknaði ikki telefonina allan dagin. Hugsaði bara um, hvussu nógv betri tað var uttan telefonina. Eg fekk nógv meira við í undirvísingini og var nógv meira avslappað uttan hana. Næstan øll hugdu í telefonina 5. hvønn minutt, og tað sá nú láturligt út í mínum eygum. Eg var blivin glað um, at eg segði ja til hesa royndina, og at eg var tætt við at hava klárað tað. Bara tveir dagar eftir. Hetta fer ikki at vera nakar trupulleiki nú.

**Leygardag**

Tíðliga leygardagin kom ein vinkona á vitjan. Tað var sera hugnaligt at sita við hennara lið, meðan hon sat og sendi myndir á snapchat, og eg fekk ikki orðið á hana... Men tað var ikki meir enn tað vanliga, og eg legði heldur ikki meir í tað, enn eg vanliga geri. Eg eri bara glað, at eg eri ikki eitt appleoffur longur. Eg klári meg væl uttan iPhone. Tó var tað eitt sindur keðiligt uttan hana seinni á kvøldinum, tí tað var ball, og tað einasta myndatólið eg hevði, var eitt einnýtismyndatól, og harvið var tað avmarkað, hvussu nógvar myndir eg kundi taka. Tað var einasta orsøk til, at eg saknaði hana eitt sindur tað kvøldið.

**Sunnudag**

Eg var ikki heima fyrr enn umleið kl. 16 sunnudagin, og tá tímdi eg illa at bíða til midnátt, tá ið eg kundi tendra telefonina aftur. Men eg fór bara á telduna, setti meg at surfa á feitum heimasíðum og lurtaði eftir góðum tónleiki. Og á midnátt hevði eg ikki eingong hug at tendra telefonina, so eg læt vera. Eg legði meg at sova og læt mína iPhone sova eina nátt afturat í skuffuni.

Eg skuldi ikki nýta teldu ella iPad ístaðin fyri mína iPhone, og tað var tað, sum eg helt fór at verða ringast. Vit hava tríggjar iPaddar í húsinum, og eg siti vanliga við einum um morgunin. Men tavagud, eg hugsaði yvirhøvur ikki um tað hesa vikuna.



Mynd: Rannvá Andreasen - Röddin.fo

# 4 Sólarmyrking

- Greið í stuttum frá, hvat tekstirnir eru um
- Greið frá, hvussu tú upplivdi 20. mars 2015
- Hugleið um tað at ferðast til serligar hendingar




Mynd: Edward Fuglø

**Full sólarmyrking 20. mars í 2015**

Fríggjadagin tann 20. mars í 2015 klokkan 9:40:12 rakar ein full sólarmyrking Mykineshólm og fer síðan um allar oyggjarnar. Um leið hálvan annan minutt seinni kemur myrkrið til eystasta punktið á Fugloynni og fer so víðari norðureftir. Í Føroyum verður longst myrkt í Mykineshólmi, har tað verður myrkt í 2 minuttir og 24 sekund.

Ein sólarmyrking er, tá ið mánin stendur ímillum sólina og jørðina, soleiðis at jørðin kemur í skuggan av mánanum. Tá ið sólarmyrkingin er full, verður myrkt eina løtu, og so verður ljóst aftur. Fullar sólarmyrkingar eru ógvuliga sjáldsamar, og seinasta fulla sólarmyrkingin í Føroyum var 30. juni í 1954.

Tað er við spenningi, at føroyingar og onnur bíða eftir sólarmyrkingini í 2015. Ferðavinnan hevur brynjað seg í fleiri ár, og nógv ferðafólk koma til Føroya. Nøkur fólk, sum er serliga áhugað í sólarmyrkingum, fara við skipi norður um Føroyar, so tey fáa bestu møguligu umstøðurnar at uppliva sólarmyrkingina. Onnur fara at fylgja sólarmyrkingini við flogfari, so áhugin er stórur.

(www.snar.fo)

## Fullsett ferðamannaskip til Føroya

Vit hava leigað Princess Seaways í eina góða viku frá DFDS, og vit rokna við at selja allar 1.200 ferðaseðlarnar, sum vit hava sett til sølu. Vit hava longu selt helvtina, og vit hava rúma tíð til at selja restina, og tí eri eg rímiliga vísur í, at tað verður útselt, tá vit fara avstað í mars 2015.

Tað sigur Erik von Fey, sum eigur og rekur ferðaskrivstovuna Hjørring Rejsecenter, sum sambært heimasíðuni bara hevur eitt ferðamál á skránni. Nevniliga ferðina til Føroya í sambandi við sólarmyrkingina, sum verður um gott og væl eitt ár.

Portal.fo hevur tosað við Erik Fey og spurt hann, hví hann skipar fyri hesari ferðini.

- Tað geri eg, tí tað eru nógv fólk, sum hava áhuga fyri sólarmyrkingini, og sum tí eisini vilja sleppa til Føroya at síggja eina fulla sólarmyrking.

Men hví eitt ferðamannaskip? Hví ikki gistingarhús?

- Vit hava eisini selt ”vanligar” ferðir til Føroya, har fólk gista á gistingarhúsum. Men tað er jú ein sannroynd, at talið av gistingarhúsum í Føroyum er avmarkað og harvið eisini seingjartalið, og tá áhugin er størri, hava vit funnið upp á hesa loysnina, sigur Erik Fey.

Ferðin byrjar 14. mars 2015, tá farið verður til Amsterdam, og so verður fyrst siglt til Newcastle, har teir flestu bretarnir koma umborð. Og so verður kósin sett móti Kollafirði, har skipið skal liggja, meðan tað er í Føroyum. Farið verður úr aftur Føroyum leygardagin 21. mars, og Princess Seaways er aftur í Amsterdam mánadagin 23. mars 2015.

Men hvat er tað, sum ger, at áhugin er so mikið stórur, at helmingurin av ferðaseðlunum eru seldir?

Sólarmyrking er eitt sjáldsamt fyribrigdi, sum nógv fólk vilja sleppa at síggja. Tí er áhugin fyri Føroyum øgiliga stórur, og tí er eftirspurningurin eftir ferðum, bæði við skipi og vanligum ferðum, eisini stórur, sigur Erik Fey.

Tá talan er um eina skipaða ferð, har fólk býr umborð, verður skipað fyri nógvum ymsum tiltøkum umborð, millum annað halda serfrøðingar fyrilestrar.

(www.portal.fo 27. nov. 2013)



http://www.stamps.fo/Files/Billeder/stamps.fo/Myndir/Tak%20ni%C3%B0ur%20PDF/Arsprogram_2015%20FO.pdf

# 5 Risakonan við kambfjøðurini

- Greið í stuttum frá skaldskapi av mannamunni
- Greina og tulka ævintýrið
- Vís á ævintýreyðkenni í hesum ævintýrinum
- Hvør er boðskapurin í ævintýrinum?

Maður og kona áttu trý børn. Børnini fóru at reka neyt ein morgunin og komu at einum helli, har sum ein gomul blind kelling stóð og mól. Tey fóru inn og tóku mjøl av kvørnini frá henni, so nógv, at hon fór at sakna og hevði fyri munni á sær:

”Annaðhvørt er tað músin, ið melur, ella er tað tjóvurin, ið stjelur, ella ruggar henda gamla ikki rætt.”

Hon at leita; men meðan hon leitaði, sluppu tey sær út og heim til foreldrini við mjølinum.

Annan morgunin fara tey avstað aftur at reka neyt, koma aftur at hellinum og fara inn. Tá liggur hin gamla og knoðar. Tey við tað sama í pottin at taka deiggið frá henni; men hon følir, at tað minkar í pottinum, og sigur:

”Aftur lokist helli mítt! verði her ongar dyr!”

Síðan trilvar hon um hellið, fangar børnini og sigur við tey:

”Eri eg ikki prúð?”

Jú, siga tey: tað er einki uttan ein kambfjøður á hálsinum, sum misprýðir hana. Hon spyr, um tey kunnu fáa sær hana burtur. Ja, siga tey: høvdu tey havt eitt svørð. So biður hon tey taka sítt svørð, sum hongur á bróstinum. Elsti drongurin tekur svørðið niður og høggur høvdið av henni. Síðan kvetta tey hana sundur, seta afturpartin upp á eina sneis fram við eldin og rýma.

Ein son átti henda gamla, sum var útistaddur. Tað fyrsta, ið risadrongurin kemur heim, trívur hann eftir hesari steik, ið fram við eldin stendur.

”Fý fý, hetta er rumpustykkið av mommu,” rópar hann og flýr á dyr, men fer skeivt og dettur í eitt vatn, sum er fyri durunum øðrumegin við, og druknar.

So fingu børnini og foreldur teirra hellið og alt tað, ið har var.

Jakob Jakobsen: “Færøske folkesagn og æventyr”, 1898-1901